gult6 cyan6 magenta6 svart6

Fígging flytir ferðing eftir reyv

Av tí, at Fíggjarmálastýrið ikki kann góðtaka leiguhækkan upp á 1.500,- krónur um mánan, noyðist Ferðaráðið at gera nýggjan leigusáttmála, sum er knappar 6.000,- krónur dýrari um mánan, enn tann gamli leigusáttmálin var

FERÐAVINNA
Edvard Joensen

Hjørdis og Åse flyta í hesum døgum Ferðaráðið úr Gongini yvir í Vágsbotn

Mynd: Jens Kristian Vang

Ferðráðið flytir úr Gongini yvir í Vágsbotn, tí P/F Trygd skal brúka hølini, har Ferðaráðið nú er, og sum Føroya Banki eigur. Sosialurin hevur fingið at vita, at ein leiguhækkan upp á 1.500,- krónur um mánan, sum Fíggjarmálastýrið ikki kann góðkenna, er orsøkin. Hinvegin verður nýggi leigusáttmálin hjá Ferðaráðnum 5.866,- krónur dýrari, enn tann núverandi. Og nýggju hølini hjá Ferðaráðnum liggja nógv verri fyri enn tey gomlu, tá hugsað verður um at fáa fremmand ferðafólk inn á gólvið.

Málið snýr seg um, at Føroya Banki, sum eigur hølini, Ferðaráðið hevur húsast í, vildi hækka leiguna frá 800,- krónum fyri fermeturin, til 900,- krónur fyri fermeturin.

Fíggjarmálastýrið svaraði aftur, at Stýrið ikki kann góðtaka hægri leigu enn kr. 800,- fyri fermeturin fyri høli, sum tað almenna leigar.

Hølini, sum Ferðaráðið leigar í gamla Sjóvinnubankanum í Gongini, hava eina gólvvídd upp á 180 fermetrar, og hevði árliga leiguhækkingin sostatt verið 18.000,- krónur ella 1.500,- krónur um mánan.

Talan er um smápengar fyri Føroya Banka, men bankin vildi so kortini hækka leiguna. Tá Fíggjarmálastýrið ikki vildi góðtaka hækkingina, varð Ferðaráðið sagt upp, og P/F Trygd, sum er tryggingarfelag hjá Føroya Banka, flytir í hølini.

Størri og dýrari

Men søgan endar ikki har, tí Ferðaráðið skal hava onnur høli at verða í. Tey vórðu funnin í kjallaranum hjá Føroya Fiskimannafelag í Vágsbotni. Tey eru 268 fermetrar til víddar og kosta árliga 214.400,- krónur at leiga. Tá er leigan 800,- krónur fyri fermeturin, sum Fíggjarmálastýrið kann góðtaka.

Um Fíggjarmálastýrið hinvegin gekk við til at hækka leiguna í Gongini við 100,- krónur fyri fermeturin, hevði árliga leigan hjá Ferðaráðnum verið 162.000,- krónur, sum hevði verið ein nettosparing upp á kr. 52.400,- um árið ella 4.366,ð krónur um mánan í mun til tann leigusáttmálan, sum nú er gjørdur við Føroya Fiskimannafelag.

Men tað er ikki alt. Hølini, sum Ferðaráðið skal flyta inn í í Vágsbotni, skulu umbyggjast, soleiðis, at Ferðaráðið kann brúka tey til sítt endamál. Tann umbyggingin fer samlað at kosta 150.000,- krónur. Og tað er meira, enn tað hevði kostað at leigað í Gongini í eitt heilt ár við teirri leiguni, sum Føroya Banki ynskti í nýggja sáttmálanum.

Hesar 150.000,- krónurnar hevur Ferðaráðið ikki fingið serstaka játtan til, og verða tær tí tiknar av rakstrinum hjá Ferðaráðnum.

Burtur frá ferðafólkunum

Umframt kemur so, at flytingin av Ferðaráðnum frá gullrandaðu adressuni í Gongini til ein kjallara í Vágsbotni er beinleiðis eftir reyv, tá hugsað verður um at tæna fremmandum ferðafólki, sum kemur til Føroya.

Hølini, sum Ferðaráðið flytir úr, lógu uttan samanbering nógv best fyri í landinum yvirhøvur hjá fremmandafólki at finna. Hjá øllum, sum komu í land av ferðamannaskipunum, sum komu til Havnar - og tað gera tey flestu nú einaferð - varð skiltið hjá Ferðaráðnum tað fyrsta, tey fingu eyga á. Og rættiliga nógv komu eisini inn á gólvið at fáa upplýsingar og aðra hjálp.

Nú Ferðaráðið flytir yvir í Vágsbotn, verður hesin møguleikin ikki til staðar. Nú skal ferðamaðurin leita eftir skrivstovuni hjá Ferðaráðnum, og tað kann væl gerast trupult hjá einum fremmandum.

Væl verður tað lættari hjá teimum, sum koma við egnum seglbátum og slíkum førum, at finna Ferðaráðið, tí tey leggja vanliga at í Vágsbotni. Men tað stóra talið fer at missa, við at Ferðaráðið flytir, eru fólk í ferðavinnuni púra sannført um.

Tá Ferðaráðið í síni tíð flutti í hølini í Gongini, sum nú verður flutt úr aftur, vaks talið á vitjandi fyrsta árið úr 3.000 upp í 9.000. Ein trífalding. Og tað hóast flytingin bara var nakrar metrar. Munurin var, at gamla adressan var í einum hølum longri úti í Gongini, sum ikki sóust av Eystaru Vág, har stóra talið av fremmandum ferðafólkum kemur á land í Føroyum.

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa viðmerkingar frá Føroya Banka ella Fíggjarmálastýrinum, áðrenn blaðið fór til prentingar.

Bæði Janus Petesen, stjóri í Føroya Banka, og Christian C. Nielsen, stjóri í Trygd, eru burturstaddir. Og Tummas Magnussen, stjóri á Lønardeildini hjá Fíggjarmálastýrinum, sum umsitir leigumál hjá tí almenna, var ikki at hitta.

Ferðaráð Føroya fer í framtíðini at halda til í kjallaranum hjá Fiskimannafelagnum í Vágsbotni
Mynd: Jens Kristian Vang

gult7 cyan7 magenta7 svart7

Ov fá ung í Vágum

Eins og í Suðuroynni og Sandoynni búgva ov fá ung millum 20 og 30 ár í Vágum. Hetta er ein avleiðing av, at Vágar eru millum tey økini, ið hava ment seg minst síðani búskapar-kreppuna

ØKISMENNING
John Johannessen

Ov fá ung og serliga ov fáar ungar kvinnur í Vágum er ein hóttan móti oynni.

Hetta staðfestir økismenningarálitið.

Økismenningarálitið ger greitt, at ein framhaldandi gongd við færri og færri kvinnum í aldursbólkinum 20 til 29 ár og 30 til 39 ár kann skapa bygnaðarligar trupulleikar, ið føra við sær, at færri og færri børn verða fødd. Langtíðarárinið av hesum kann sambært álitinum verða, at fólkatalið í Vágum verður minni og minni.

Ov fá arbeiðstilboð

Bólkurin, sum hevur gjørt økismenningarálitið, heldur vantandi arbeiðstilboð til kvinnur møguliga vera eina orsøk til skeivleikan í aldurs- og kynssamansetingini fyri Vágar.

Av tí, at ov fá arbeiðstilboð eru til kvinnur í Vágum, verða tær noyddar at flyta í onnur øki at arbeiða. Hetta er sama mynstur, sum er kent í Sandoynni og ávísan mun í Suðuroynni, staðfestir økismenningarálitið.

Fyri at betra um hesa gongd, mælir økismenningarbólkurin til, at fleiri arbeiðstilboð til kvinnur verða skapt í økinum.

Sambandið er forðing

Men trupult er at skapa støðugt arbeiði í Vágum. Og av hesi orsøk vóru miðal lønarútgjaldingarnar millum tær lægstu í landinum í 1999.

Orsøkina til vantandi vinnuna í oynni, heldur økismenningarbólkurin vera vánaliga undirstøðukervið, ið ikki hevur nøktað tørvin hjá vinnurekandi í Vágum.

Men undirstøðukervið hjá Vágoynni er væl áleiðis at gerast munandi betri. Arbeiðið at gera undirsjóvartunnil undir Vestmannasundi gongur væl, og innan tvey ár fer at bera til at koyra gjøgnum tunnilin millum Vágar og meginøkið.

Hetta, heldur økismenningarbólkurin, uttan iva fer at geva vinnuni í oynni betri karmar at virka undir, umframt at fólk fáa øktan møguleika at nýta arbeiðs- og tænastutilboð í høvuðsstaðarøkinum.

Men samstundir sær økismenningarbólkurin eisini eina avbjóðing í fasta sambandinum um Vestmannasund. Bólkurin ger vart við, at hetta fer at skapa økta kapping hjá handils og tænastuvinnuni í oynni.

Oljan kann styrkja kunnleikan

Økismenningarálitið staðfestir eisini, at kunnleikaumhvørvið í Vágum er ein veikleiki í dag.

Men økismenningarbólkurin væntar, at ein komandi oljuvinna kann betra um hetta. Bólkurin heldur, at um rætti leikluturin hjá flogvøllinum verður funnin í eini komandi oljuvinnu, kann hann gerast ein týdningarmikil partur av framhaldandi menning í oynni. Hetta kann síðani økja um tørvin á fólki við útbúgving, soleiðis at kunnleikaumhvørvið í síni heild verður styrkt.

Góð útlit

Útlitini fyri, at Vágoyggin fer at menna seg saman við miðstaðarøkinum eru hóast alt góð.

Økismenningarbólkurin væntar, at tann lítla frá-flytingin, sum hevur verið úr Vága sýslu seinastu árini, verður vend til eina lítla tilflyting. Hetta fer saman við burðaravloplinum at hava við sær, at fólkatalið veksur.

Økismenningarbólkurin vísir á, at um gongdin í Vága sýslu broytist munandi til tað betra og fer at líkjast gongdini í Suður-Eysturoy, kann fólkatalið í Vágum koma upp á 3.454 í 2024. Fólkatalið var í 1999 2.617.

– Undirsjóvartunnilin undir Vestmannasundi kann fáa stóra ávirkan á hesi viðurskifti, við tað, at Vágar verða knýttar fastar at meginøkinum – og verða møguleikarnir fyri at arbeiða og brúka tilboðini í meginøkinum tá munandi betri. Harumframt verður tann náttúrligi marknaðurin hjá framleiðslu- og tænastuvinnum í Vágum størri, tá koyrandi verður undir Vestmannasundi, sigur økismenningarbólkurin í áliti sínum.

Tískil ber til at staðfesta, at útlitini fyri Vágoynna eru góð, hóast eina skeiva gongd í fólkatalinum og kynssamansetingini seinastu árini.

Myndin, sum økismenningarbólkurin hevur gjørt, sýnir sterkar síður, veikar síður, møguleikar og hóttanir hjá Vágoynni



Laaaannngt vikuskifti í Keypmannahavn

hósdag til mánadag...ja!

1.995,-

Unna tær eina fríløtu í Keypmannahavn. Eitt vikuskifti har tú tekur tær av løttum og nýtur tað lýggja várveðrið, meðan tú spákar ein túr á Stroynum ella fært tær ein góðan bita í Nýhavnini. Í Keypmannahavn eru nógv freistandi tilboð.

Tú fert úr Vágum hóskvøld kl. 20.40. Tú fært sostatt arbeitt allan hósdagin, og tú hevur allan fríggjadagin í Keypmannahavn. Hygg í Út í Heim, sum er sent í hvørt hús í Føroyum. Har eru fleiri góð tilboð.

Atlantic Airways hevur nú hesar eykatúrar:

Til Keypmannahavnar:	hóskvøld	20.40
Til Føroya:	fríggjadag	09.00
Til Keypmannahavnar:	sunnukvøld	17.30
Til Føroya:	mánadag	09.00

Ferðaavgjald sum er kr.365,- kemur afturat prísinum

SANDUR · TEL: 355 355

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 10 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo